## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag og leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útnyrðingi og kavaælingur, men eisini sólglottar. Hitalagið millum ÷1 stig ÷5 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Hann minkar vindin niður í lot av norði ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitalagið millum ÷1 og ÷4 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul millum útnyrðing og landnyrðing og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 2 og 6 stig.

Sangbólkurin VITIN:

# Føroyingar komið og syngið við!

**"Føroyingar komið og syngið við!" eru slagorðini hjá sangbólkinum Vitin í Klaksvík, sum í hesum døgum ferðast kring landið har teir boða krossins evangelium gjøgnum orð, kvartettsang, felagssang, leik og samfelag**



*Sangarar og tónleikarar í sangbókinum Vitin syngja saman*
*Mynd: Bárður Lydersen*

SANGBÓLKUR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Sunnukvøldið 6. februar meðan politiski fundurin í Norðurlandahúsinum var beinleiðis í bæði Útvarpi Føroya og SVF, savnaðust millum 1100 og 1300 fólk til sangløtu í ítróttarhøllini á Nabb, har sangbólkurin Vitin úr Betesda í Klaksvík skipaði fyri.

Umframt at sangbólkurin Vitin sang, var felagssangur, dramaleikur, og ein evangelisk tala. Eftir løtuna vórðu øll boðin til kaffi og køkur.

Bólkurin hevur ferðast nógv kring landið seinastu árini. Í 2003 og 2004 var hann til tilsamans 60 møtir og onnur tiltøk, har teir sungu .

Teir sum manna sangbólkin eru: Jóhan Páll Joensen, Torkil Mørkøre, Petur Vitalis og Jógvan Høj. Teir fýra hava sungið saman síðan 2001, fyrst undir navninum "Yngra kvartettin" og nú hava teir so broytt navnið til sangbólkurin Vitin. Afturat sær hava teir tónleikararnar: Dávur Johannesen, spælir á gittar og syngur, Jóan Petur Hansen spælir el-gittar, Guttorm Matras spælir akustiskan gittar, Leivur Vitalis situr við trummurnar, og Esbern Hansen passar uppvørpuna.

Dramaleikinum taka tey ungu í samkomuni sær av, og í ár hava Sunneva Østerø og Jógvan Hansen spælt ein leik, meðan Sámal Mikkelsen hevur verið upplesari.

Evangelisku talunum taka Rógvi Joensen og Bogi Simonsen sær av.

Jóhan Páll sigur, at til tey stóru hallartiltøkini hava komið millum 400 og 1300 fólk, alt eftir hvar í landinum teir syngja.

Tey stóru tiltøkini í 2005 hava verið í Ítróttarhallunum í Klaksvík, á Giljanesi, í Runavík, á Hálsi.

Leygardagin 19. februar gongur so leiðin til Suðuroyar, har teir syngja í Ítróttarhøllini í Trongisvági.

Jóhan Páll sigur, at teir eru glaðir fyri at syngja og eru sera takksamir fyri ta góðu móttøkuna teir hava fingið allastaðni í landinum. Tað krevur nógva tíð og orku, og tað kostar nógv at leiga ítróttarhallir og alla teknisku útgerðina, men tað er tað vert.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -14 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | -0 |
| Ammassalik | -9 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | -1 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 4 |
| London | 4 |
| Tromsø | 3 |
| Bergen | 0 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | -4 |
| Keypmannah. | -1 |
| Helsinki | -6 |
| Moskva | -1 |
| Berlin | 0 |
| Warzawa | 0 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 1 |
| Paris | 0 |
| Madrid | 6 |
| Róm | 8 |
| Malorca | 9 |
| Athen | 12 |
| Malta | 7 |
| Tunis | 8 |
| Beijing | 0 |
| New Dehli | 20 |
| Bangkok | 35 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | -- |
| New York | 9 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | -- |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | 32 |
| La Paz | 10 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 22 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 996 hPa. vestan fyri Ísland fer eystureftir og kuldabrúgvin haðani verður yvir Føroyum í kvøld – hóskvøldið. Eitt hátrýst, 1037 hPa í útsynning úr Írlandi stendur mestsum í stað og mennist.




**Í dag:**
Vestan fyri lágtrýstið við Lofoten rekur køld luft av norði móti Føroyum. Hátrýstið í útsynning úr Írlandi stendur í stað og ein hátrýstryggur til Grønlandsfjørðin kemur hendavegin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 16/2 kl. $06^{00}$–17/2. $06^{00}$. Hitin í gjár: 4,8°
Minsti hiti máldur í febr.: +3,7° - Mesti hiti máldur í febr.: 11,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,8 mm – mált frá 16/2 kl. $06^{00}$–17/2 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í februar: 59,6 mm

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT
WWW.JAVNI.FO
JAVNI

## VESTFALLSKYRRINDI

18. februar

16. febr. Fyrra kvarter
20. febr. Mánin longst frá jørðini
24. febr. Fullmániew

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 18. feb | 02.32 | 14.57 | 01.32 | 13.57 | 01.47 | 14.12 | 04.32 | 16.57 | 05.32 | 17.57 | 00.47 | 13.12 | - | 12.12 | 02.47 | 15.12 | 03.47 | 16.12 | 02.17 | 14.42 | 03.32 | 15.57 |
| 19. feb | 03.22 | 15.47 | 02.22 | 14.47 | 02.37 | 15.02 | 05.22 | 17.47 | 06.22 | 18.47 | 01.37 | 14.02 | 00.37 | 13.02 | 03.37 | 16.02 | 04.37 | 17.02 | 03.07 | 15.32 | 04.22 | 16.47 |
| 20. feb | 04.12 | 16.36 | 03.12 | 15.36 | 03.27 | 15.51 | 06.12 | 18.36 | 07.12 | 19.36 | 02.27 | 14.51 | 01.27 | 13.51 | 04.27 | 16.51 | 05.27 | 17.51 | 03.57 | 16.21 | 05.12 | 17.36 |
| 21. feb | 05.00 | 17.21 | 04.00 | 16.21 | 04.15 | 16.36 | 07.00 | 19.21 | 08.00 | 20.21 | 03.15 | 15.36 | 02.15 | 14.36 | 05.15 | 17.36 | 06.15 | 18.36 | 04.45 | 17.06 | 06.00 | 18.21 |
| 22. feb | 05.42 | 18.02 | 04.42 | 17.02 | 04.57 | 17.17 | 07.42 | 20.02 | 08.42 | 21.02 | 03.57 | 16.17 | 02.57 | 15.17 | 05.57 | 18.17 | 06.57 | 19.17 | 05.27 | 17.47 | 06.42 | 19.02 |

5 707265 100050 >